# Grønur politikkur er eisini reyður tráðurin hjá dagstovnum og skúlum

LEVI MØRK



**Í starvsvenjing**
Eg minnist aftur á árið 1998, tá ið eg var í starvsvenjing hjá "Holbæk fritidscenter" í Holbæk í Danmark. Eg var sera yvirraskaður av, at børnini í frítíðarskúlanum, longu í 1998, vóru von við at skilja rusk. Børnini høvdu ikki loyvi til at hava breyðið í matpakkanum innpakkað við silvurpappír.

**Eg visti ikki nakað um grønan politikk**
Eg fór at undrast hví hetta var soleiðis. Tí grønur politikkur var fullkomliga ókendur fyri meg sum føroyingur. Eg var vitandi um umhvørvi og vanda fyri tí ringa, um tú dálkar ov nógv. Men ein grønan politikk innan dagstovnar, kendi eg einki til.

**Holbæk hevur ein góðan grønan politikk**
Jú, eg spurdi mín vegleiðara, og hon svaraði mær, at Holbæk kommuna hevði ein fastan politikk á økinum og tað var galdandi fyri allar stovnar hjá kommununi.

**Børnini lærdu meg**
Starvsfólkini høvdu til uppgávu at læra børnini at; skilja rusk, eta grønt, spara upp á hita, spara upp á ravmagn og spara upp á vatn osv. Eisini var endurnýsla, av pappíri og mjólkapakkum inni í mynduni. Eg var sera bilsin, men eg vandi meg skjótt við tankan og gjørdi tað sama sum hini starvsfólkini. Um eg var í iva, søgdu børnini mær frá, hvussu ið eg skuldi skilja rusk?

**Gulrótin var grønasti stovnur**
Eg var sera yvirraskaður, hvussu væl øll starvsfólk vóru greið yvir henda politiska boðskap frá Holbæk kommunu. Gulrótin var, at hvørt ár fekk grønasti stovnur hjá Holbæk kommunu eitt heiðursbræv og gávu. Uppá hvør hevði megnað uppgávuna best og grønast.

**Ein partur av námsætlan**
Í hesum frítíðarskúla, har eg var í starvsvenjing, har høvdu tey tilskiljað henda politikk inn í teirra námsætlan fyri stovnin. Hetta var ein partur av teirra námsfrøðiligu ætlan, at læra børnini um grønan politikk. Men hetta var eftir tí fasta og góða politikkinum hjá Holbæk kommunu.

**Hygg á heimasíðuna hjá Holbæk kommunu**
Sí annars á heimasíðuni hjá "Holbæk kommune" Endurgeving av link. http://www.holbaeknettet.dk/site.aspx?RoomId=8&NewsId=6133&MenuId=18&langref=1&SplashId=114

**Umhvørvisvikan**
Ja, vit hava nógv at læra her hjá Tórshavnar kommunu. Men eg veit, at Hoyvíkar skúli hevur ein góðan grønan politikk, har tey m. a. hava "Umhvørvisviku" sum eisini er ein partur av politikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

**Vit skulu hava ein meira sjónligari politikk á økinum**
Vit skulu hava ein meira sjónligan grønan politikk á økinum. Har vit í tí dagliga hugsa grønt, ikki bert í eina viku. Nei, hetta skal vera ein fastur politikkur hjá Tórhavnar kommunu. Har skúlar og stovnar generelt eru meira tilvitað um hetta grøna økið.

**Lat okkum hugsa grønt**
Ja, lat okkum hugsa grønt, nú allir dagstovnar hjá Tórshavnar kommunu skulu/eru í gongd við at gera námsætlanir fyri dagstovna øki.

*Vel Levi Mørk, eg hugsi eisini grønt.*

# Føroyar eiga at royna ES-leiðina

MAGNI LAKSÁFOSS



**Eftir at Edmund Joensen hevur lagt fram úrslitið av fundi við ES-kommiserin fyri víðkan av Europasamveldinum, er greitt, at hetta er rætta leiðin at ganga. Týdningarmesta undantakið fyri Føroyar er fiskivinnupolitikkurin, og nú tykist vera greitt, at her man bera til at fáa undantak. Sjálvandi royna aðrir politiskir flokkar – og stundum eisini fjølmiðlar – at grugga boðskapin, men hetta verður nokk tíverri altíð ein partur av politiska veruleikanum**

**Greiður boðskapur**
Ábendingarnar frá ES-kommiserinum eru greiður: "*ES ynskir at fáa londini fyri norðan, tvs. Ísland, Norra og Føroyar, inn í felagsskapin, og tí kann hugsast at Føroyar kunnu fáa góðar sømdir í upptøkusamráðingum.*"

Sjálvandi kann ein kommiserur ikki geva lyfti ella bindandi tilsøgnir um sømdirnar, men hann kann koma við ábendingum, soleiðis at farast kann aftur til baklandið og soleiðis at eitt sakligt kjak kann taka seg upp.

Hetta er júst tað, ið Edmund Joensen hevur tryggjað sær frá kommiserinum. Tað er at fagnast um, tí hetta er stimbur til kjakið um føroyskan europapolitikk, sum í løtuni fokuserar einoygt uppá EFTA-limaskap.

**Undantøk fyri fiskivinnupolitikkin**
Týdningarmesta undantakið fyri Føroyar er sjálvsagt fiskivinnupolitikkurin.

Tað hevur verið ført fram ferð eftir ferð, at tað ikki er gjørligt fyri Føroyar at fáa undantak fyri fiskivinnupolitikkinum, men júst henda mytan er nú manað í jørðina.

ES-kommiserurin gevur ábending um, at tað er sannlíkt, at ES er sinnað at lata Føroyum undantak á hesum økinum. Hetta er ein sera týðandi upplýsing at fáa frá ES, sum kollveltur allan søguligan kritikk móti, at Føroyar gerast partur av ES.

Um gjørligt er at fáa undantak fyri fiskivinnupolitikkinum – hvat er so í vegin fyri at gerast partur av ES?

**Væl fyriskipaður fundur**
Ført hevur verið fram, at talan var einans um túnatos – kaffiprát – korridorsnakk – og ikki um nakran veruligan fund. Hetta er beinleiðis ósatt!

Talan var sjálvsagt um óformligan fund, tí tað er jú einans landsstýrið, ið kann hava formligar fundir við samráðingum við ein mótpart av hesum slag. Men ein óformligur fundur er als ikki tað sama sum túnatos!

Fundurin var fyriskipaður gjøgnum formligu ambasadu-kanalirnar, ið vit hava atgongd til, gjøgnum ríkið. Dagsskráin fyri fundin, við spurningunum til kommiserin, var væl og virðiliga avtalað frammanundan, so kommiserurin hevði fyrireikað seg væl og virðiliga fyri at kunna svara spurningunum.

At kritisera fólkatingsmannin fyri undirgravandi virksemi er ósømiligt. Tvørturímóti hevur hann greitt hildið seg til formligar kanalir á diplomatiskum stigi.

**Ótrúliga stórir fyrimunir**
Fyrimunirnir fyri Føroyar og føroyska vinnulívið eru eyðsýndir. Møguleikarnir fyri nýggjum útflutningi, at skapa vørumenning, at styrkja mentanina, at menna landið eru munandi betri við einum ES-limaskapi enn tá vit eru uttan fyri ES.

Í mong ár hevur vinnulívið merkt sviðan av at standa uttan fyri felagsskapin. Vit hava verið noydd til at innrætta okkum eftir lógum og direktivum úr ES – stutt sagt: Vit hava fingið vansarnar men ikki fyrimunirnar.

Nú stendur hurðin endiliga opin fyri, at vit kunnu fara eftir fyrimununum!

Kostnaðurin av ES-limaskapi er, at vit skulu opna okkara dyr á sama hátt sum ES. Hetta merkir í stuttum, at vit skulu halda áfram við somu avtalum við ES, sum vit longu hava. Ein broyting vil tó vera, at tá t.d. almenn arbeiðir verða boðin út, skulu tey bjóðast út í øllum ES, eins og vit eisini fáa rætt til at bjóða uppá øll almenn arbeiðir í ES.

Hetta er ein ógvuliga avmarkaður kostnaður, tá man sær allar fyrimunirnar fyri sær – hetta er jú okkara suverent største marknaður og ein sera ríkur marknaður at fáa atgongd til.

**ES-leiðin tykist greið**
Eftir at nýggju upplýsingarnir eru komnir á borðið tykist ES-leiðin greið. Hetta er rætta leiðin at ganga.

Tað kundi verið áhugavert at hoyrt frá vinnulívinum, um hvørji sjónarmið vinnan hevur uppá nýggju áhugaverdu upplýsingarnar, sum nú eru komnir á borðið.

# Í 2014 skyldar Kommunan 250 mió. kr.

JAN CHRISTIANSEN
býráðslimur



At økja skuldina frá 0 kr. til 250 mió.kr eftir fimm árum sigur nógv um ábyrgdarkensluna hjá sitandi meirilutaa.

Um verandi meiriluti framhaldandi kemur at ráða í Tórshavnar Býráð, kemur kommunan at skylda 250 mió. kr. í 2014. Seinatu fýra árini er rakstrurin øktur við 186 mió. kr., úr 312 mió. kr til 498 mió. kr. Ein óhoyrd øking upp á yvir 60%. Harav er sjálv fyrisitingin økt við ikki minni enn 23 mió.kr.

Í rundum tølum er inntøkan hjá kommununi 600 mió. kr. og raksturin 500 mió. kr. so eftir eru 100 mió. kr. til íløgur. Nú ein raðfesting av íløgunum komandi árini endiliga er komin, er ætlanin at gera íløgur fyri 130 mió. kr. pr. ár. komandi fimm árini. Tað vil geva eitt hall uppá 150 mió. kr. Hetta hallið má antin fíggjast við lántøku, ella við at hækka skattin. Verandi fíggjarætlan byggir upp á eina lántøku á 100 mió. kr, so tilsamans kemur kommunan at skylda 250 mió. kr í 2014. Óneyðugt er at minna á, at tá verandi samgonga tók við, var øll skuld niðurgoldin.

Omanfyri standandi er enn eitt prógv fyri, at Javnaðar- og Tjóveldisflokkurin eru farnir ótrúliga lætt um skattaborgarans pening.

Um tú vilt, at skil aftur kemur á kommununa, so er at velja Fólkaflokkin, lista A, tann 11. november. Fólkaflokkurin er garanturin fyri at skatturin ikki hækkar, og vit borga fyri betri fíggjarligum skili.

Lesið Sosialin - so eru tit við

# Bussleiðin

ESTHER JOENSEN
Argjaboðagøta 36
Argir

Bert ein lítil viðmerking til lesarabræv hjá Elin Lindenskov, í Sosialinum 24.-26/10-2008. Elin sigur í brævi sínum, at tað er sera umráðandi, at vit røkja og menna Bussleiðina og at hon røkkur út til allar borgarar í kommununi. Jú, jú, tað eru vit samd um, men eitt øki, sum Bussleiðin ikki røkkur, eru borgararnir ið búgva á Argjaboða. Um vit skulu gera brúk av Bussleiðini, skulu vit ganga heim til skúlan á Argjum og er hettar umleið 1 km. Gott hevði verið, um tað gloymda økið á Argjaboða eisini varð tikið við.